**SKJAL 1**

**Paralelltekstur**

**Samanhalda galdandi lógartekst við lógartekst í uppskotinum**

| Galdandi | Uppskotið |
|---|---|
| **§ 2.** Lógin fevnir um børn í aldrinum frá 0 til fylta 18. árið.<br>*Stk. 2.* Í serligum førum kunnu fyriskipanir, ið eru settar í verk, innan barnið hevur fylt 18 ár, halda áfram, til viðkomandi fyllir 21 ár, um viðkomandi samtykkir. Um fyriskipanin ikki rínur við viðkomandi, og tað tí ikki tænir nøkrum endamáli, at viðkomandi er fevndur av hesi lóg, kann fyriskipanin ikki halda áfram.<br>*Stk. 3.* Somuleiðis fevnir lógin í teimum í § 14 nevndu førum um ófødda barnið. | **§ 2.** Lógin fevnir um børn í aldrinum frá 0 til fylta **23**. árið.<br>*Stk. 2*. **Fyri ung í aldrinum 18 – 23 ár kunnu bert tær fyriskipanir, ið eru nevndar í § 15 b setast í verk. Hesar fyriskipanir kunnu bert setast í verk, um ein fyriskipan er sett í verk eftir hesi lóg, tá tann ungi fyllir 18 ár.**<br><br>*Stk. 3.* Somuleiðis fevnir lógin í teimum í § 14 nevndu førum um ófødda barnið. |
| **§ 4.** Kommunurnar skulu seta barnaverndarnevndir. Smáar kommunur skulu samstarva við aðrar kommunur um val av barnaverndarnevndum. Fyri hvørja barnaverndarnevnd skulu vera minst 1.500 íbúgvar. Barnaverndarnevndir verða valdar av kommunustýrunum.<br>*Stk. 2.* Í eini barnaverndarnevnd skulu vera í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir. Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu hava viðkomandi førleika ella útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- ella bygdaráð, vera samvitskusamir og álítandi borgarar, ið hava reina revsiváttan og góðan kunnleika til børn.<br>*Stk. 3.* Barnaverndarnevndin verður vald eftir kommunuval fyri valskeiðið, sum kommunustýrið situr. Barnaverndarnevndin velur sjálv formann og næstformann.<br>*Stk. 4.* Kommunustýrið kann lata stýrinum í sínum kommunufelagsskapi heimildina at velja eina felags barnaverndarnevnd, sum er galdandi fyri meira enn eina kommunu.<br>*Stk. 5.* Samstarvsøkini sambært stk. 1 skulu vera landfrøðiliga samanhangandi. Tá ið serlig landfrøðilig atlit tala fyri tí, kann landsstýrismaðurin loyva, at eitt samstarvsøki er minni enn 1.500 íbúgvar, tó ikki minni enn 1.000 íbúgvar.<br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin góðkennir kommunal samstørv sambært stk. 1.<br>*Stk. 7.* Fyri luttøku á fundum í barnaverndarnevndum fáa limir og varalimir samsýning sambært reglunum í kommunustýrislógini.<br>*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann, í samráð við kommunurnar, áseta nærri reglur um at manna barnaverndirnar. | **§ 4.** Kommunurnar skulu seta barnaverndarnevndir. Smáar kommunur skulu samstarva við aðrar kommunur um val av barnaverndarnevndum. Fyri hvørja barnaverndarnevnd skulu vera minst **3.000** íbúgvar. Barnaverndarnevndir verða valdar av kommunustýrunum.<br>*Stk. 2.* Í eini barnaverndarnevnd skulu vera í minsta lagi 3 limir og samsvarandi varalimir. **Formaðurin og meirilutin í nevndini skulu í minsta lagi hava eina viðkomandi miðallanga útbúgving. Harumframt skulu limirnir lúka treytirnar til val til bý- ella bygdaráð og hava reina revsiváttan.**<br>*Stk. 3.* Barnaverndarnevndin verður vald eftir kommunuval fyri valskeiðið, sum kommunustýrið situr. Barnaverndarnevndin velur sjálv formann og næstformann.<br>*Stk. 4.* Kommunustýrið kann lata stýrinum í sínum kommunufelagsskapi heimildina at velja eina felags barnaverndarnevnd, sum er galdandi fyri meira enn eina kommunu.<br>*Stk. 5.* **Samstarvsøkini sambært stk. 1 skulu vera samfeld landafrøðiliga ella samferðsluliga**<br><br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin góðkennir kommunal samstørv sambært stk. 1.<br>*Stk. 7.* Fyri luttøku á fundum í barnaverndarnevndum fáa limir og varalimir samsýning sambært reglunum í kommunustýrislógini.<br>*Stk. 8.* Landsstýrismaðurin kann, í samráð við kommunurnar, áseta nærri reglur um at manna barnaverndirnar. |

| | |
|---|---|
| **§ 5.** Kommunustýrið skal syrgja fyri, at fakfólk, við í minsta lagi miðallangari útbúgving, verða sett at umsita barnaverndarmál. Harumframt skulu fakfólkini vera samvitskusamir og álítandi borgarar, ið hava reina revsiváttan og góðan kunnleika til børn.<br><br>*Stk. 2.* Um fakfólkini sambært stk. 1 eru ógegnig í einum máli, skal kommunustýrið syrgja fyri, at annað egnað fakfólk verður sett at loysa málið.<br>*Stk. 3.* Um fakfólkini sambært stk. 1 ikki hava kunnleika til fyrisitingarrætt, skipar Barnaverndarstovan fyri, at fakfólkini fáa eftirútbúgving í fyrisitingarrætti, undir hesum málsviðgerð sambært fyrisitingarlógini og hesi lóg, sbr. § 13, stk. 2.<br>*Stk. 4.* Barnaverndarumsitingin skal hava fastar, væl lýstar upp- og afturlatingartíðir, og tað skal vera møguligt at fáa fatur á barnaverndarformanninum ella einum, sum hann hevur latið hesa uppgávu til, um tørvur er á hjálp uttan fyri arbeiðstíð.<br><br>*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann, í samráð við kommunurnar, áseta nærri reglur um kommunalt samstarv um barnaverndarumsiting. | **§ 5. Kommunustýrið skal syrgja fyri, at starvsfólk, við í minsta lagi miðallangari viðkomandi útbúgving verða sett at umsita barnaverndarmál. Í minsta lagi eitt av starvsfólkunum skal hava eina sosialfakliga útbúgving. Harumframt skulu starvsfólkini hava reina revsiváttan.**<br>*Stk. 2.* Um fakfólkini sambært stk. 1 eru ógegnig í einum máli, skal kommunustýrið syrgja fyri, at annað egnað fakfólk verður sett at loysa málið.<br>*Stk. 3.* Um fakfólkini sambært stk. 1 ikki hava kunnleika til fyrisitingarrætt, skipar Barnaverndarstovan fyri, at fakfólkini fáa eftirútbúgving í fyrisitingarrætti, undir hesum málsviðgerð sambært fyrisitingarlógini og hesi lóg, sbr. § 13, stk. 2.<br>*Stk. 4.* **Barnaverndarumsitingin skal hava fastar, væl lýstar upp- og afturlatingartíðir, og tað skal vera møguligt at fáa fatur á barnaverndarumsitingini umvegis telefon innanfyri hesar tíðir. Um tørvur er á hjálp uttan fyri arbeiðstíð skal vera møguligt at fáa fatur á barnaverndarnevndarformanninum ella einum, sum hann hevur latið hesa uppgávu.**<br>*Stk. 5.* Landsstýrismaðurin kann, í samráð við kommunurnar, áseta nærri reglur um kommunalt samstarv um barnaverndarumsiting. |
| **§ 8.** Barnaverndartænastan hevur ábyrgd av, eftir fráboðan ella av sínum eintingum, at gáa eftir børnum í kommununi, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, og av at seta fyriskipanir í verk, sum á besta hátt kunnu loysa trupulleikarnar.<br><br>*Stk. 2.* Barnaverndartænastan skal í størstan mun stremba eftir at fáa samstarv í lag við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, um at seta fyribyrgjandi fyriskipanir í verk. Um tað ikki verður mett at vera ráðiligt at halda áfram við fyribyrgjandi fyriskipanum í samstarvi við foreldrini, skal barnaverndartænastan taka stig til, at aðrar fyriskipanir uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, verða settar í verk. | **§ 8.** Barnaverndartænastan hevur ábyrgd av, eftir fráboðan ella av sínum eintingum, at gáa eftir børnum í kommununi, sum liva undir viðurskiftum, ið kunnu skaða teirra heilsu og menning, og av at seta fyriskipanir í verk, sum á besta hátt kunnu loysa trupulleikarnar.<br>***Stk. 2.* Barnaverndartænastan skal veita barninum tryggleika á tann hátt, at barnið kann venda sær til barnaverndartænastuna við sínum trupulleikum, uttan at hetta verður fráboðað foreldrunum.**<br>*Stk. 3.* Barnaverndartænastan skal í størstan mun stremba eftir at fáa samstarv í lag við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, um at seta fyribyrgjandi fyriskipanir í verk. Um tað ikki verður mett at vera ráðiligt at halda áfram við fyribyrgjandi fyriskipanum í samstarvi við foreldrini, skal barnaverndartænastan taka stig til, at aðrar fyriskipanir uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, verða settar í verk.<br>***Stk. 4.* Um tað verður mett at gagna samstarvinum, kann barnaverndartænastan** |

| | |
|---|---|
| | **við samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, heita á óheftan meklara um at hjálpa við at fáa samstarv í lag millum partarnar.** |
| **§ 9.** Barnaverndarnevndin tekur avgerð í málum, har samtykki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár, tó undantikið í málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, sbr. §§ 19, 22, 23 og 24 og viðvíkjandi § 15, stk. 4.<br>*Stk. 2.* Harumframt tekur Barnaverndarnevndin avgerð í málum sambært § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1, § 20, stk.1 og § 21, stk. 2 uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. | **§ 9.** Barnaverndarnevndin tekur avgerð í málum, har samtykki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár, tó undantikið í málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, sbr. §§ 19, 22, 23 og 24 og viðvíkjandi **§ 15 a**.<br>*Stk. 2.* Harumframt tekur Barnaverndarnevndin avgerð í málum sambært § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1, § 20, stk.1 og § 21, stk. 2 uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan.<br>***Stk. 3.* Barnaverndarnevndin tekur avgerð um meklara eftir § 8, stk. 3.** |
| **§ 11.** Landsstýrismaðurin setur eina Høvuðsbarnaverndarnevnd til at taka avgerð í málum, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár, tó undantikið § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1 og § 20, stk. 1.<br>*Stk. 2.* Harumframt tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð í málum viðvíkjandi rætti til ókeypis umboðan, sbr. § 57, stk. 3, í øllum málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, sbr. §§ 19, 22, 23 og 24, í málum um familjuviðgerð og dagstovnatilboð á stovnum hjá landinum, sbr. § 15, stk. 4<br>*Stk. 3.* Barnaverndarnevndin leggur mál fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8. | **§ 11.** Landsstýrismaðurin setur eina Høvuðsbarnaverndarnevnd til at taka avgerð í málum, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár, tó undantikið § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1 og § 20, stk. 1.<br>*Stk. 2.* Harumframt tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð í málum viðvíkjandi rætti til ókeypis umboðan, sbr. § 57, stk. 3, í øllum málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku og samverurætti, sbr. §§ 19, 22, 23 og 24, í málum um familjuviðgerð og dagstovnatilboð á stovnum hjá landinum, sbr. **§ 15 a og fyriskipan eftir § 15 b, stk. 3.**<br>*Stk. 3.* Barnaverndarnevndin leggur mál fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8. |
| **§ 13.** Barnaverndarstovan er ein felagskommunalur stovnur.<br>*Stk. 2.* Uppgávan hjá Barnaverndarstovuni er m.a. at:<br>1) arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í landinum,<br>2) virka sum ráðgevi hjá landsstýrismanninum viðvíkjandi stevnumiðum á barnaverndarøkinum,<br>3) vegleiða og ráðgeva barnaverndartænastunum í almennum spurningum viðvíkjandi viðgerð av barnaverndarmálum,<br>4) veita barnaverndartænastunum undirvísing viðvíkjandi uppgávum teirra sambært hesi lóg,<br>5) veita samdøgursstovnum ráðgeving og vegleiðing<br>6) skipa og umsita fosturforeldraskipanina sambært kapitli 5 í hesi lóg, | **§ 13.** Barnaverndarstovan er ein felagskommunalur stovnur.<br>*Stk. 2.* Uppgávan hjá Barnaverndarstovuni er m.a. at:<br>1) arbeiða fyri at styrkja og samskipa barnaverndarøkið í landinum,<br>2) **strikað**<br>3) vegleiða og ráðgeva barnaverndartænastunum í almennum spurningum viðvíkjandi viðgerð av barnaverndarmálum,<br>4) veita barnaverndartænastunum undirvísing viðvíkjandi uppgávum teirra sambært hesi lóg,<br>5) **strikað**<br>6) skipa og umsita fosturforeldraskipanina sambært kapitli 5 í hesi lóg,<br>7) syrgja fyri menning á økinum, |

| | |
|---|---|
| 7) syrgja fyri menning á økinum,<br>8) savna saman og umsita hagtøl á økinum. | 8) savna saman og umsita hagtøl á økinum. |
| **§ 14**. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.<br><br>*Stk. 2.* Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari t.d. misrøkir, meinslar, misnýtir ella handfer barn soleiðis, at álvarsamur vandi er fyri tess sálarligu ella likamligu heilsu ella búning, hevur skyldu at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.<br><br>*Stk. 3.* Fráboðast skal eisini viðvíkjandi kvinnum, ið eru við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna álvarsama rúsevnismisnýtslu, sálarsjúku ella sálartrupulleikar.<br>*Stk. 4.* Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49. | **§ 14**. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskifti **ella orsøk til at halda, at viðurskifti eru,**, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.<br>*Stk. 2.* **Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum** Fráboðarin kann vera ónavngivin.<br>*Stk. 3.* **Fráboðast skal eisini eftir stk. 1 og 2 um kvinnu, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.**<br>*Stk. 4.* Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45 og 49. |
| **§ 15.** Um kanningin sambært § 45 vísir, at neyðugt er at seta fyriskipanir í verk fyri barnið sambært hesi lóg, skal barnaverndarnevndin við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir í verk, undir hesum:<br>1) veita sálarfrøðiliga ella aðra hóskandi hjálp til barnið og/ella familjuna,<br>2) veita familjuviðgerð ella líknandi stuðul,<br>3) veita stuðul í heiminum,<br>4) veita heilt ella partvíst ansingarpláss á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi fyri børn, tá ið tað av sosialum, námsfrøðiligum og fíggjarligum orsøkum verður mett at vera neyðugt, men tá ið fíggjarligt frípláss ikki kann veitast,<br>5) hjálpa við at finna hóskandi útbúgvingarpláss, arbeiðspláss ella líknandi til barnið,<br>6) menna frítíðarvirksemið hjá barninum,<br>7) geva tilboð um umlættingarskipan hjá góðkendum fosturforeldrum, | **§ 15.** Um kanningin sambært § 45 vísir, at neyðugt er at seta fyriskipanir í verk fyri barnið sambært hesi lóg, skal barnaverndarnevndin við samtykki frá og í samstarvi við tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, seta fyriskipanir í verk, undir hesum:<br>1) veita sálarfrøðiliga ella aðra hóskandi hjálp til barnið og/ella familjuna,<br>2) veita familjuviðgerð ella líknandi stuðul,<br>3) veita stuðul í heiminum,<br>4) **veita heilt ella partvíst ansingarpláss á dagstovni, í dagrøkt ella líknandi fyri børn, tá ið tað av sosialum orsøkum verður mett at vera neyðugt,**<br>5) hjálpa við at finna hóskandi útbúgvingarpláss, arbeiðspláss ella líknandi til barnið,<br>6) menna frítíðarvirksemið hjá barninum,<br>7) geva tilboð um umlættingarskipan hjá góðkendum fosturforeldrum, |

| | |
|---|---|
| 8) stuðla foreldrum at fáa og fullføra viðgerð vegna sjúku, rúsevnismisnýtslu ella aðrar persónligar trupulleikar,<br>9) tilnevna ein fastan persón, ið barnið altíð kann seta seg í samband við við sínum trupulleikum,<br>10) veita persónligan ráðgeva til barnið,<br>11) veita barninum tryggleika á tann hátt, at barnið kann venda sær til barnaverndartænastuna við sínum trupulleikum, uttan at hetta verður fráboðað foreldrunum.<br>*Stk. 2.* Barnaverndarnevndin kann um neyðugt seta fyriskipanir eftir stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9 og 10 í verk, hóast foreldur/foreldramyndugleiki ikki loyva tí, um tað má metast at vera av munandi týdningi fyri barnsins serliga tørv á stuðli, og tá ið endamálið við fyriskipanini verður mett at kunna røkkast uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Um barnið hevur fylt 15 ár, skal samtykki í hesum føri tó fáast frá barninum, áðrenn nøkur fyriskipan verður sett í verk.<br>*Stk. 3.* Umframt at kommunan heldur útreiðslurnar, ið standast av stk. 1, sbr. § 68, kann barnaverndarnevndin veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið fylgja av fyriskipanum eftir stk. 1, nr. 1-8, tá ið foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar. | 8) stuðla foreldrum at fáa og fullføra viðgerð vegna sjúku, rúsevnismisnýtslu ella aðrar persónligar trupulleikar,<br>9) tilnevna ein fastan persón, ið barnið altíð kann seta seg í samband við við sínum trupulleikum,<br>10) veita persónligan ráðgeva til barnið,<br>11) **veita stuðul til barn, 16 ár ella eldri, í egnum kamari ella egnari íbúð.**<br>*Stk. 2.* Barnaverndarnevndin kann um neyðugt seta fyriskipanir eftir stk. 1, nr. 1, 4, 5, 6, 9 og 10 í verk, hóast foreldur/foreldramyndugleiki ikki loyva tí, um tað má metast at vera av munandi týdningi fyri barnsins serliga tørv á stuðli, og tá ið endamálið við fyriskipanini verður mett at kunna røkkast uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan. Um barnið hevur fylt 15 ár, skal samtykki í hesum føri tó fáast frá barninum, áðrenn nøkur fyriskipan verður sett í verk.<br>*Stk. 3.* Umframt at kommunan heldur útreiðslurnar, ið standast av stk. 1, sbr. § 68, kann barnaverndarnevndin veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið fylgja av fyriskipanum eftir stk. 1, nr. 1-8, tá ið foreldrini ikki sjálvi megna útreiðslurnar. |
| *Stk. 4.* Mál viðvíkjandi familjuviðgerð á stovnum hjá landinum og viðvíkjandi tilboði á dagstovni fyri børn, ið eru fevnd av hesi lóg og sum ikki kunnu integrerast á kommunalan dagstovn, skulu leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina. | **§ 15 a. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann innskriva familju til familjuviðgerð á stovni hjá landinum sum dag ella samdøgurstilboð.**<br>***Stk. 2.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann innskriva barn, ið er fevnt av hesi lóg, og sum ikki kann integrerast á kommunalum dagstovni, á dagstovn hjá landinum.**<br>***Stk. 3.* Barnaverndarnevndin kann veita fíggjarligan stuðul til útreiðslur, ið standast av fyriskipan eftir stk. 1 og 2, tá ið foreldrini ikki sjálv megna útreiðslurnar. Um familjan verður innskrivað til familjuviðgerð eftir stk. 1, fáa foreldrini endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku, tó í mesta lagi við eini upphædd svarandi til hægstu sjúkradagpeningaveiting.** |
| | *Fyriskipanir til ung í aldrinum 18 – 23 ár.*<br><br>**§ 15 b. Barnaverndarnevndin kann avgera, at ein fyribyrgjandi fyriskipan skal halda fram eftir, at tann ungi hevur fylt 18 ár, ella seta aðra fyriskipan í verk eftir § 15, stk. 1, nr. 1, 5, 6, 9, 10 og 11.** |

| | |
|---|---|
| | *Stk. 2.* **Er tann ungi umsorganaryvirtikin eftir § 19, tá viðkomandi fyllir 18 ár, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um, at:**<br>**1) fyriskipanin skal halda fram,**<br>**2) seta í verk uppihald í stovnslíknandi fyriskipan,**<br>**3) seta í verk útslúsing frá uppihaldsstaðnum,**<br>*Stk. 3.* **Ein ella fleiri av fyriskipanunum í stk. 1 og 2 skulu setast í verk tá tann ungi fyllir 18 ár, um tað verður mett at vera av munandi týdning fyri, at tann ungi kann megna eina sjálvstøðuga vaksnamannatilveru. Fyriskipanin kann tó bert setast í verk um tann ungi samtykkir.**<br>*Stk. 4.* **Fyriskipanir eftir stk. 1 og 2 skulu halda uppat, tá endamálið er rokkið ella fyriskipanin ikki longur tænir endamálinum, og í seinasta lagi tá tann ungi fyllir 23 ár. Fyriskipan eftir stk. 2, nr. 1 skal tó halda uppat í seinasta lagi tá tann ungi fyllir 21 ár.** |
| **§ 16.** Barnaverndarnevndin skal hava eftirlit við, hvussu barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk.<br>*Stk. 2.* Barnaverndarnevndin skal við jøvnum millumbilum meta um, hvørt ein fyriskipan virkar eftir ætlan, og um, hvørt neyðugt er at seta nýggjar fyriskipanir í verk. Um so er, skal barnaverndarnevndin taka stig til, at nýggjar fyriskipanir verða settar í verk. | **§ 16.** Barnaverndarnevndin skal hava eftirlit við, hvussu barnið og foreldrini hava tað, eftir at ein fyriskipan er sett í verk.<br>*Stk. 2.* **Barnaverndarnevndin skal í seinasta lagi 3 mánaðir eftir at ein fyriskipan er sett í verk meta um, hvørt fyriskipanin virkar eftir ætlan, ella um neyðugt er at seta nýggjar fyriskipanir í verk, og um ætlanin eftir § 47 skal broytast. Barnaverndarnevndin skal hereftir meta um fyriskipanirnar minst 6. hvønn mánað.**<br>*Stk. 3.* **Er barnið sett heiman, skal eftirlitið eftir stk. 1 umfata minst tvær árligar eftirlitisvitjanir, har barnaverndartænastan tosar við barnið, helst í einrúmi. Metingin eftir stk. 1 skal grundast á eftirlitisvitjanirnar.**<br>*Stk. 4.* **Barnaverndarnevndin skal taka stig til, at nýggjar fyriskipanir verða settar í verk og ætlanin eftir § 47 broytt, um metingin eftir stk. 1 vísir, at tørvur er á hesum.** |
| *Stk. 3.* Barnaverndarnevndin kann seta heimið undir umsjón við at seta eftirlitsverja í heimið.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um heimildir og skyldur hjá eftirlitsverjum. | **§ 16 a. Barnaverndarnevndin kann seta heimið undir umsjón við at seta eftirlitsverja í heimið.**<br>*Stk. 2.* **Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um heimildir og skyldur hjá eftirlitsverjum.** |
| **§ 17.** Er vandi fyri, at eitt barn verður munandi skatt av at verða verandi í heiminum, kann barnaverndarnevndin uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, avgera at taka barnið úr heiminum uttan rættarúrskurð.<br>*Stk. 2.* Um barnaverndarnevndin ikki er saman, kann formaðurin ella, tá honum berst frá, næstformaðurin avgera at taka barnið úr | **§ 17.** Er vandi fyri, at eitt barn verður munandi skatt av at verða verandi í heiminum, kann barnaverndarnevndin uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, avgera at taka barnið úr heiminum uttan rættarúrskurð.<br>*Stk. 2.* Um barnaverndarnevndin ikki er saman, kann formaðurin ella, tá honum berst frá, næstformaðurin avgera at taka barnið úr |

| | |
|---|---|
| heiminum sambært stk. 1.<br>*Stk. 3.* Avgerðin skal skjótast til ber og innan 2 yrkadagar leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.<br>*Stk. 4.* Í teimum førum, har eitt barn er uttan umsorgan, skal barnaverndarnevndin seta í verk neyðugar fyriskipanir.<br>*Stk. 5.* Avgerðin sambært stk. 1, 2 og 4 um at taka barnið bráðfeingis úr heiminum kann ikki standa við í meira enn tríggjar mánaðir. | heiminum sambært stk. 1.<br>*Stk. 3.* Avgerðin skal skjótast til ber og innan 2 yrkadagar leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.<br>*Stk. 4.* Í teimum førum, har eitt barn er uttan umsorgan, skal barnaverndarnevndin seta í verk neyðugar fyriskipanir.<br>*Stk. 5.* Avgerðin sambært stk. 1, 2 og 4 um at taka barnið bráðfeingis úr heiminum kann ikki standa við í meira enn **fýra** mánaðir. |
| **§ 19.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um umsorganaryvirtøku í hesum førum:<br>1) tá ið álvarsom vanrøkt er í mun til dagligu umsorganina fyri barninum,<br>2) um barnið er fyri harðskapi ella øðrum álvarsomum ágangi,<br>3) um líkt er til, at barnsins heilsa ella menning er í álvarsomum vanda vegna foreldranna vantandi umsorgan,<br>4) um barnið hevur misnýtslutrupulleikar, brotsligan atburð ella aðrar álvarsamar sosialar trupulleikar, ella<br>5) um barnið hevur aðrar atferðar- ella tillagingartrupulleikar.<br>*Stk. 2.* Yvirtøka av umsorganini fyri einum barni sambært stk. 1 skal bert nýtast, um mett verður, at umsorganaryvirtøka er neyðug og best fyri barnið, og tá ið fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært hesi lóg ikki verða mettar at skapa eitt nøktandi úrslit fyri barnið.<br>*Stk. 3.* Barnaverndarnevndin hevur uppfylgjanina av málinum um hendi sambært § 16. | **§ 19.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um umsorganaryvirtøku í hesum førum:<br>1) tá ið álvarsom vanrøkt er í mun til dagligu umsorganina fyri barninum,<br>2) um barnið er fyri harðskapi ella øðrum álvarsomum ágangi,<br>3) um líkt er til, at barnsins heilsa ella menning er í álvarsomum vanda vegna foreldranna vantandi umsorgan,<br>4) um barnið hevur misnýtslutrupulleikar, brotsligan atburð ella aðrar álvarsamar sosialar trupulleikar, ella<br>5) um barnið hevur aðrar atferðar- ella tillagingartrupulleikar.<br>*Stk. 2.* Yvirtøka av umsorganini fyri einum barni sambært stk. 1 skal bert nýtast, um mett verður, at umsorganaryvirtøka er neyðug og best fyri barnið, og tá ið fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært hesi lóg ikki verða mettar at skapa eitt nøktandi úrslit fyri barnið.<br>*Stk. 3.* Barnaverndarnevndin hevur uppfylgjanina av málinum um hendi sambært § 16.<br>***Stk. 4.* Í sambandi við umsorganaryvirtøku skal barnaverndartænastan hjálpa barninum við at finna ein persón, ið kann tilnevnast sum fastur persónur eftir § 15, nr. 9, meðan barnið er sett heiman.** |
| **§ 20.** Er eitt barn sett heiman við samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, kann barnaverndarnevndin avgera, at barnið í mesta lagi tríggjar mánaðir ikki skal flytast/setast heimaftur.<br>*Stk. 2.* Ein slík avgerð kann einans takast, um eingin rímilig orsøk er fyri, at barnið skal flytast, ella um flytingin kann vera barninum at skaða.<br>*Stk. 3.* Avgerðir sambært stk. 1 skulu skjótast til ber, og innan 2 yrkadagar, leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.<br>*Stk. 4.* Barnaverndarnevndin hevur uppfylgjanina av málinum um hendi sambært § 16. | **§ 20.** Er eitt barn sett heiman við samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, kann barnaverndarnevndin avgera, at barnið í mesta lagi tríggjar mánaðir ikki skal **setast** heimaftur.<br>*Stk. 2.* Ein slík avgerð kann einans takast, um eingin rímilig orsøk er fyri, at barnið skal flytast, ella um flytingin kann vera barninum at skaða.<br>*Stk. 3.* Avgerðir sambært stk. 1 skulu skjótast til ber, og innan 2 yrkadagar, leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til góðkenningar.<br>*Stk. 4.* Barnaverndarnevndin hevur uppfylgjanina av málinum um hendi sambært § 16. |
| **§ 22.** Í hesi lóg hava børn og foreldur samverurætt í tann mun, samverurætturin ikki er skerdur sambært myndugleikalógini. | **§ 22.** Í hesi lóg hava børn og foreldur samverurætt í tann mun, samverurætturin ikki er skerdur sambært **foreldramyndugleikalógini**. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur støðu til, hvussu samvera skal skipast í málum viðvíkjandi yvirtøku av umsorgan.<br>*Stk. 3.* Ein avtala ella avgerð um samveru sambært myndugleikalógini er galdandi, um Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki avger annað.<br>*Stk. 4.* Tá ið tað er neyðugt fyri heilsu og menning hjá barninum, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin seta treyt um, at umboð fyri barnaverndartænastuna skal vera hjástatt undir samveru ímillum barn og foreldur.<br>*Stk. 5.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann nokta foreldrunum samverurætt, um tað verður mett at vera best fyri barnið.<br>*Stk. 6.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann í serligum førum nokta foreldrunum at vita, hvar barnið býr.<br>*Stk. 7.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann geva øðrum enn foreldrunum loyvi til samveru við barnið. | *Stk. 2.* Høvuðsbarnaverndarnevndin tekur støðu til, hvussu samvera skal skipast í málum viðvíkjandi yvirtøku av umsorgan.<br>*Stk. 3.* Ein avtala ella avgerð um samveru sambært **foreldramyndugleikalógini** er galdandi, um Høvuðsbarnaverndarnevndin ikki avger annað.<br>*Stk. 4.* Tá ið tað er neyðugt fyri heilsu og menning hjá barninum, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin seta treyt um, at umboð fyri barnaverndartænastuna skal vera hjástatt undir samveru ímillum barn og foreldur.<br>*Stk. 5.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann nokta foreldrunum samverurætt, um tað verður mett at vera best fyri barnið.<br>*Stk. 6.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann í serligum førum nokta foreldrunum at vita, hvar barnið býr.<br>*Stk. 7.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann geva øðrum enn foreldrunum loyvi til samveru við barnið. |
| **§ 23.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um at taka umsorganina varandi frá foreldrunum, um:<br>1) tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan, eitt nú vegna rúsevnismisnýtslu ella sálarlig brek,<br>2) eitt barn verður álvarsliga misrøkt, misnýtt kynsliga ella er fyri álvarsligum sálarligum ella likamligum ágangi ella eyðmýking í heiminum.<br>*Stk. 2.* Umsorganin kann bert verða tikin varandi frá foreldrunum, um tað ikki er møguligt at seta aðrar og lagaligari fyriskipanir í verk, ella um slíkar fyriskipanir hava verið royndar, men ikki givið úrslit. | **§ 23.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um at taka umsorganina varandi frá foreldrunum, um:<br>1) **tað má metast at vera sannlíkt, at foreldrini varandi ikki eru før fyri at geva barninum nøktandi umsorgan,**<br>2) eitt barn verður álvarsliga misrøkt, misnýtt kynsliga ella er fyri álvarsligum sálarligum ella likamligum ágangi ella eyðmýking í heiminum**,**<br>**3) barnið hevur verið til fosturs í 5 ár, og hevur fingið so sterkt tilknýti til fosturforeldrini, at tað má metast at vera av stórum týdningi og best fyri barnið, at tað verður verandi hjá fosturforeldrunum.**<br>*Stk. 2.* Umsorganin kann bert verða tikin varandi frá foreldrunum, um tað ikki er møguligt at seta aðrar og lagaligari fyriskipanir í verk, ella um slíkar fyriskipanir hava verið royndar, men ikki givið úrslit. |
| *Avgerð um umsorganaryvirtøku verður broytt ella sett úr gildi*<br><br>**§ 24.** Viðvíkjandi fyriskipanum um umsorganaryvirtøku sambært § 19 skal barnaverndarnevndin við jøvnum millumbilum meta um, hvørt umstøðurnar hjá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan eru broyttar soleiðis, at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, ella um støðan framvegis er soleiðis, at barnið eigur at verða verandi uttan fyri heimið. Barnaverndarnevndin leggur eftirmetingina fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir | *Avgerð um umsorganaryvirtøku verður broytt**,** sett úr gildi **ella endar***<br><br>**§ 24.** Viðvíkjandi fyriskipanum um umsorganaryvirtøku sambært § 19 skal barnaverndarnevndin við jøvnum millumbilum meta um, hvørt umstøðurnar hjá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan eru broyttar soleiðis, at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, ella um støðan framvegis er soleiðis, at barnið eigur at verða verandi uttan fyri heimið. Barnaverndarnevndin leggur eftirmetingina fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir |

**SKJAL 1**

| | |
|---|---|
| mannagongdini í kapitli 8.<br>*Stk. 2.* Metir Høvuðsbarnaverndarnevndin, at umstøðurnar eru broyttar, soleiðis at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, skal Høvuðsbarnaverndarnevndin seta avgerðina um umsorganaryvirtøku sambært § 19 úr gildi. Er støðan framvegis soleiðis, at barnið eigur at verða verandi uttan fyri heimið, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð um, at fyriskipanin skal halda áfram. | mannagongdini í kapitli 8.<br>*Stk. 2.* Metir Høvuðsbarnaverndarnevndin, at umstøðurnar eru broyttar, soleiðis at barnið aftur kann fáa nøktandi umsorgan í heiminum, skal Høvuðsbarnaverndarnevndin seta avgerðina um umsorganaryvirtøku sambært § 19 úr gildi. |
| | ***Stk. 3.*** **Metir Høvuðsbarnaverndarnevndin, at støðan framvegis er soleiðis, at barnið eigur at verða verandi uttan fyri heimið, tekur Høvuðsbarnaverndarnevndin avgerð um, at fyriskipanin skal halda áfram.**<br>***Stk. 4.*** **Hevur eitt barn ikki verið sett heiman innanfyri tað seinasta árið, kann ein fyriskipan um umsorganaryvirtøku ikki halda fram longur enn eitt ár, frá tí degi Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð um fyriskipanina, uttan við nýggjari avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.**<br>***Stk. 5.*** **Hevur eitt barn verið sett heiman innanfyri tað seinasta árið, kann ein fyriskipan um umsorganaryvirtøku ikki halda fram longur enn tvey ár, frá tí degi Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð um fyriskipanina, uttan við nýggjari avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.**<br>***Stk. 6.*** **Freistin í stk. 4 og 5 verður roknað frá tí degi, at Høvuðsbarnaverndarnevndin tók avgerð.**<br>***Stk. 7.*** **Hóast ásetingina í stk. 4 og 5, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin áseta styttri freist fyri, nær eftirmeting skal leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar.**<br>***Stk. 8.*** **Høvuðsbarnaverndarnevndin kann áseta eina longri freist enn tær í stk. 4 og 5, um umstøðurnar, ið eru grundarlagið fyri avgerðini, eftir øllum líkindum mugu væntast at vera til staðar út yvir freistina.** |
| *Stk. 3.* Tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, kunnu krevja, at eitt mál um varandi yvirtøku av umsorganini fyri einum barni sambært § 23 skal viðgerast av Høvuðsbarnaverndarnevndini av nýggjum, um umstøður teirra eru munandi broyttar. Barnaverndarnevndin leggur í hesum førum málið av nýggjum fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann tó nokta fyri, at málið verður viðgjørt av nýggjum, um málið teir seinastu 12 mánaðirnar hevur verið viðgjørt av hesi nevnd. | *Stk. 9.* Tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, kunnu krevja, at eitt mál um varandi yvirtøku av umsorganini fyri einum barni sambært § 23 skal viðgerast av Høvuðsbarnaverndarnevndini av nýggjum, um umstøður teirra eru munandi broyttar. Barnaverndarnevndin leggur í hesum førum málið av nýggjum fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina eftir mannagongdini í kapitli 8. Høvuðsbarnaverndarnevndin kann tó nokta fyri, at málið verður viðgjørt av nýggjum, um málið teir seinastu 12 mánaðirnir hevur verið viðgjørt av hesi nevnd. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 4.* Í sambandi við nýggja avgerð um umsorganaryvirtøku, kann málið um samverurætt sambært § 22 eisini verða endurskoðað.<br>*Stk. 5.* Áðrenn nýggja avgerð viðvíkjandi umsorganaryvirtøku skulu fosturforeldrini verða hoyrd.<br><br>*Stk. 6.* Barnið kann ikki setast heim aftur, um mett verður, at tað eftir eini heildarmeting kann verða atvoldin til álvarsamar trupulleikar fyri barnið, um tað verður flutt. | *Stk. 10.* Í sambandi við nýggja avgerð um umsorganaryvirtøku, **skal** málið um samverurætt sambært § 22 eisini verða endurskoðað.<br>*Stk. 11.* Áðrenn nýggja avgerð viðvíkjandi umsorganaryvirtøku skulu fosturforeldrini verða hoyrd.<br>***Stk. 12.* Eitt barn, ið er umsorganaryvirtikið sambært § 19, kann ikki setast heim aftur uttan við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Í sambandi við eina avgerð um at barnið skal setast heim aftur, ásetur Høvuðsbarnaverndin eitt tíðarskeið at fyrireika heimsetanina sbr. § 24 a.**<br>***Stk. 13.* Er barnið sett heiman við samtykki, og verður samtykkið afturtikið, skal barnaverndarnevndin leggja tilmælið fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan, í seinasta lagi 14 dagar eftir, at samtykkið er afturtikið, um barnaverndarnevndin ikki kann taka avgerð eftir § 20.**<br>*Stk. 14.* Barnið kann ikki setast heim aftur, um mett verður, at tað eftir eini heildarmeting kann verða atvoldin til álvarsamar trupulleikar fyri barnið, um tað verður flutt. |
| | **§ 24 a. Høvuðsbarnaverndarnevndin skal áseta eitt tíðarskeið at fyrireika heimsetanina. Longdin á tíðarskeiðinum kann vara upp til 6 mánaðir. Í serligum førum kann Høvuðsbarnaverndarnevndin avgera, at einki tíðarskeið skal ásetast at fyrireika heimsetanina. Longdin á tíðarskeiðinum verður ásett við atliti at:**<br>**1) møguleikanum at tryggja eina varliga og tilrættarlagda heimsetan fyri barnið,**<br>**2) fyrireikan av møguligum fyriskipanum til barnið ella foreldrini eftir at barnið er komið heim aftur,**<br>**3) møguleikanum hjá barnaverndartænastuni fyri at meta um, hvørt tað er grundarlag fyri at taka avgerð um umsorganaryvirtøku, tá foreldrini hava afturkallað samtykkið.**<br>***Stk. 2.* Tíðarskeiðið, ið verður ásett at fyrireika heimsetanina, er framhald av tí fyriskipan, ið er í løtuni eftir § 19.** |
| | **§ 24 b. Ein fyriskipan skal halda uppat, tá endamálið er rokkið, hon ikki longur tænir endamálinum, ella tá barnið fyllir 18 ár, sbr. tó § 15 b.** |
| **§ 27.** Fosturforeldraskipanin góðkennir fosturforeldur. | **§ 27.** Fosturforeldraskipanin góðkennir fosturforeldur. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Áðrenn fosturforeldur verða góðkend, skal tryggjast, at fosturforeldrini hava:<br>1) reina revsiváttan,<br>2) læknaváttan um heilsustøðu teirra,<br>3) góðar bústaðarumstøður,<br>4) fíggjarlig viðurskifti, sum eru í lagi, og<br>5) at tey hava neyðug umsorganarevni og foreldraførleika og møguligar royndir sum góðir uppalarar.<br>*Stk. 3.* Tá ið fosturforeldur eru góðkend, verður ein avtala gjørd ímillum Fosturforeldraskipanina og fosturforeldrini um, at tey m.a. skulu vera tøk at taka ímóti einum barni, tá ið tørvur er á tí.<br>*Stk. 4.* Fosturforeldur til tað einstaka barnið skulu veljast eftir tørvinum hjá barninum.<br>*Stk. 5.* Tá fosturforeldur skulu veljast, skulu fyrilit takast fyri næstrafólkum ella øðrum, ið hava tætt samband við barnið. Tó skulu fosturforeldur altíð veljast eftir tørvinum hjá barninum samb. stk. 4<br>*Stk. 6.* Tað áliggur Fosturforeldraskipanini at stuðla og fyrireika fosturforeldrini, áðrenn barnið verður latið teimum, og um tørvur er á tí geva teimum stuðul, undirvísing og vegleiðing, ímeðan barnið er til fosturs og í serligum førum eftir, at barnið er farið úr fosturheiminum.<br>*Stk. 7.* Fyribyrgjandi fyriskipanir sambært § 15 kunnu setast í verk fyri barnið og fosturforeldrini, ímeðan barnið er í fosturheiminum. | *Stk. 2.* Áðrenn fosturforeldur verða góðkend, skal tryggjast, at fosturforeldrini hava:<br>1) reina revsiváttan,<br>2) læknaváttan um heilsustøðu teirra,<br>3) góðar bústaðarumstøður,<br>4) fíggjarlig viðurskifti, sum eru í lagi, og<br>5) at tey hava neyðug umsorganarevni og foreldraførleika og møguligar royndir sum góðir uppalarar.<br>*Stk. 3.* Tá ið fosturforeldur eru góðkend, verður ein avtala gjørd ímillum Fosturforeldraskipanina og fosturforeldrini um, at tey m.a. skulu vera tøk at taka ímóti einum barni, tá ið tørvur er á tí.<br>*Stk. 4.* Fosturforeldur til tað einstaka barnið skulu veljast eftir tørvinum hjá barninum.<br>*Stk. 5.* Tá fosturforeldur skulu veljast, skulu fyrilit takast fyri næstrafólkum ella øðrum, ið hava tætt samband við barnið. **Hóast ásetingina í stk. 2 kunnu hesi veljast, um tey kunnu góðkennast sum ítøkiliga egnað í mun til tað ávísa barnið.**<br>*Stk. 6.* **Fosturforeldur skulu luttaka á einum skeiði um at verða fosturforeldur, áðrenn barnið verður latið teimum.**Tað áliggur Fosturforeldraskipanini at stuðla og fyrireika fosturforeldrini, áðrenn barnið verður latið teimum, og um tørvur er á tí geva teimum stuðul, undirvísing og vegleiðing, ímeðan barnið er til fosturs og í serligum førum eftir, at barnið er farið úr fosturheiminum.<br>*Stk. 7.* Fyribyrgjandi fyriskipanir sambært § 15 kunnu setast í verk fyri barnið og fosturforeldrini, ímeðan barnið er í fosturheiminum. |
| **§ 29.** Áðrenn eitt barn verður sett í fosturheim, ásetur Fosturforeldraskipanin samsýningina til fosturforeldrini sambært galdandi reglum.<br>*Stk. 2.* Fosturforeldraskipanin rindar fosturforeldrunum samsýning, tá ið tey hava tikið eitt barn til fosturs.<br>*Stk. 3.* Harumframt rindar Fosturforeldraskipanin uppihaldsútreiðslur og aðrar útreiðslur viðvíkjandi barninum.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um samsýning til fosturforeldur, gjald fyri uppihald og aðrar útreiðslur viðvíkjandi barninum. | **§ 29.** Áðrenn eitt barn verður sett í fosturheim, ásetur Fosturforeldraskipanin samsýningina til fosturforeldrini sambært galdandi reglum.<br>*Stk. 2.* **Avvarðandi barnaverndartænasta** rindar fosturforeldrunum samsýning **sbrt. stk. 1** tá ið tey hava tikið eitt barn til fosturs.<br>*Stk. 3.* Harumframt rindar **avvarðandi barnaverndartænasta** uppihaldsútreiðslur og aðrar útreiðslur viðvíkjandi barninum.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um samsýning til fosturforeldur, gjald fyri uppihald og aðrar útreiðslur viðvíkjandi barninum. |
| **§ 33.** Landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur samdøgursstovnar og aðrar samdøgursfyriskipanir, við tilknýttum sertænastum, fyri børn, ið eru fevnd av hesi lóg.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur dagstovnar fyri børn, ið eru fevnd av hesi lóg og sum ikki kunnu integrerast á kommunalum dagstovni.<br>*Stk. 3.* Í serligum førum, tá ið talan er um sera | **§ 33.** Landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur samdøgursstovnar og aðrar samdøgursfyriskipanir, við tilknýttum sertænastum, fyri børn, ið eru fevnd av hesi lóg.<br>*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur dagstovnar fyri børn, ið eru fevnd av hesi lóg og sum ikki kunnu integrerast á kommunalum dagstovni.<br>*Stk. 3.* **Landsstýrismaðurin stovnsetur og rekur** |

| | |
|---|---|
| trupul børn, ið ikki kunnu fáa nøktandi stovnspláss í Føroyum, kann landsstýrismaðurin loyva, at børn verða sett á stovn uttanlands.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann loyva øðrum at stovnseta og reka stovnar sambært stk. 1 og stk. 2. Í hesum førum skulu serlig atlit takast til, at tilboðið verður nøktandi, og avtala skal gerast um treytir fyri stovnsetan, innihaldi í tilboðnum, rættindi hjá børnum á stovninum, eftirlit v.m. Barnaverndarnevndin á staðnum, har stovnurin skal liggja, skal hoyrast, áðrenn loyvi til stovnsetan verður givið.<br>*Stk. 5.* Fyri stovnsetan av stovni skal góðkenning fáast til vega frá neyðugum myndugleikum sambært aðrari lóggávu.<br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um virksemi á stovnum, ið eru stovnsettir sambært hesi lóg. | **samdøgursstovnar fyri familjur, ið eru fevndar av hesi lóg.**<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin kann loyva øðrum at stovnseta og reka stovnar sambært **stk. 1 - 3**. Í hesum førum skulu serlig atlit takast til, at tilboðið verður nøktandi, og avtala skal gerast um treytir fyri stovnsetan, innihaldi í tilboðnum, rættindi hjá børnum **og familjum** á stovninum, eftirlit v.m. Barnaverndarnevndin á staðnum, har stovnurin skal liggja, skal hoyrast, áðrenn loyvi til stovnsetan verður givið.<br>*Stk. 5.* Fyri stovnsetan av stovni skal góðkenning fáast til vega frá neyðugum myndugleikum sambært aðrari lóggávu.<br>*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um virksemi á stovnum, ið eru stovnsettir sambært hesi lóg. |
| **§ 35.** Tá ið avgjørt er, at eitt barn skal á ein samdøgursstovn, áliggur tað Høvuðsbarnaverndarnevndini at seta barnið á rættan samdøgursstovn. Hetta verður gjørt í samráð við avvarðandi barnaverndartænastu og leiðaran av samdøgursstovninum.<br>*Stk. 2.* Barnið kann ikki útskrivast fyri ásettu tíðina uttan góðkenning frá Høvuðsbarnaverndarnevndini | **§ 35. Eitt barn verður innskrivað á samdøgursstovn við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini. Høvuðsbarnaverndarnevndin ansar eftir, at barnið verður sett á rættan samdøgursstovn.**<br>***Stk. 2.* Um einki nøktandi pláss er á samdøgursstovni í Føroyum, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um, at barnið skal setast á stovn uttanlands.**<br>***Stk. 3.* Barnið kann ikki útskrivast uttan við avgerð frá Høvuðsbarnaverndarnevndini, sbr. § 24, stk. 2, 12 og 13.** |
| **§ 37.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um, at eitt barn, sum hevur víst álvarsamar atferðartrupulleikar, við t.d. álvarsomum ella afturvendandi brotsverki ella við framhaldandi misnýtslu av rúsevnum, verður sett á stovn til eygleiðingar, kanningar og viðgerð í upp til 4 vikur, uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella frá barninum.<br>*Stk. 2.* Um barnið hevur tørv á longri viðgerð, og | **§ 37. Um tað verður mett neyðugt fyri at kunna gera av, um tað er eyðsýndur vandi fyri álvarsomum skaða á barnsins heilsu ella menning, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um, at barnið skal setast á stovn ella innleggjast á sjúkrahús, her í millum á psykiatriska deild, til eygleiðingar og kanningar, uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella frá barninum. Ein slík kanning skal verða liðug innan 2 mánaðir eftir avgerðina hjá Høvuðsbarnaverndarnevndini.**<br>*Stk. 2.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann taka avgerð um, at eitt barn, sum hevur víst álvarsamar atferðartrupulleikar, við t.d. álvarsomum ella afturvendandi brotsverki ella við framhaldandi misnýtslu av rúsevnum, verður sett á stovn til eygleiðingar, kanningar og viðgerð í upp til 4 vikur, uttan samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella frá barninum.<br>*Stk. 3.* Um barnið hevur tørv á longri viðgerð, og |

| | |
|---|---|
| samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella frá barninum, ikki er til skjals, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um, at barnið skal ávísast til ein viðgerðar- ella upplæringarstovn í upp til 12 mánaðir. Í serligum førum kann uppihaldið leingjast við 12 mánaðum. | samtykki frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, ella frá barninum, ikki er til skjals, kann Høvuðsbarnaverndarnevndin taka avgerð um, at barnið skal ávísast til ein viðgerðar- ella upplæringarstovn í upp til 12 mánaðir. Í serligum førum kann uppihaldið leingjast við 12 mánaðum. |
| **§ 45.** Um rímilig orsøk er til at halda, at eitt barn hevur tørv á, at fyriskipan verður sett í verk sambært hesi lóg, skal barnaverndarumsitingin skjótast til ber kanna málið, sbr. § 49.<br>*Stk. 2.* Frágreiðing skal fáast til vega frá teimum myndugleikum og øðrum, ið verða mett at kunna geva týðandi frágreiðingar í málinum.<br>*Stk. 3.* Myndugleikarnir og onnur sambært stk. 2 hava skyldu til at geva frágreiðing í málinum, sbr. § 74, stk. 1.<br>*Stk. 4.* Kanningin skal fremjast soleiðis, at hon minst møguligt skaðar nakran avvarðandi, og skal ikki gerast meiri víðfevnd enn neyðugt.<br>*Stk. 5.* Barnaverndarumsitingin skal ansa eftir, at ikki óneyðugur kunnugleiki til kanningina verður breiddur út.<br>*Stk. 6.* Foreldrini ella tey, sum barnið býr hjá, kunnu ikki seta seg upp ímóti, at ein kanning sambært hesi lóg verður framd við vitjan í heiminum.<br>*Stk. 7.* Barnaverndarumsitingin kann krevja at fáa samtalu við barnið í einrúmi, um møguligt saman við serkønum fólki. Barnið eigur í hesum førum at hava hjásitara.<br>*Stk. 8.* Øll skjøl í málinum skulu skrásetast og varðveitast á einum tryggum staði.<br>*Stk. 9.* Tá ið kanning er liðug, ger barnaverndarumsitingin eitt tilmæli, sum verður lagt fyri barnaverndarnevndina. | **§ 45.** Um rímilig orsøk er til at halda, at eitt barn hevur tørv á, at fyriskipan verður sett í verk sambært hesi lóg, skal barnaverndarumsitingin skjótast til ber kanna málið, sbr. § 49. **Kanningin skal taka støði í eini heildarmeting og skal fevna um barnsins:**<br>**1) menning og atferð,**<br>**2) familjuviðurskifti,**<br>**3) skúlaviðurskifti,**<br>**4) heilsuviðurskifti,**<br>**5) frítíðarviðurskifti og vinskap, og**<br>**6) onnur viðkomandi viðurskifti.**<br>***Stk. 2.* Í kanningini skal barnaverndarumsitingin lýsa styrkir og trupulleikar hjá barninum, familjuni og netverkinum rundan um barnið. Hevur barnið fylt 16 ár, skal kanningin harumframt lýsa tey serligu viðurskifti, ið atlit skal takast til, í sambandi við val av fyriskipan til hendan aldursbólk, sbr. §§ 15, 15 b og 19.**<br>*Stk. 3.* Frágreiðing skal fáast til vega frá teimum myndugleikum og øðrum, ið verða mett at kunna geva týðandi frágreiðingar í málinum.<br>*Stk. 4.* Myndugleikarnir og onnur sambært **stk. 3** hava skyldu til at geva frágreiðing í málinum, sbr. § 74, stk. 1.<br>*Stk. 5.* Kanningin skal fremjast soleiðis, at hon minst møguligt skaðar nakran avvarðandi, og skal ikki gerast meiri víðfevnd enn neyðugt.<br>*Stk. 6.* Barnaverndarumsitingin skal ansa eftir, at ikki óneyðugur kunnugleiki til kanningina verður breiddur út.<br>*Stk. 7.* Foreldrini ella tey, sum barnið býr hjá, kunnu ikki seta seg upp ímóti, at ein kanning sambært hesi lóg verður framd við vitjan í heiminum.<br>*Stk. 8.* Barnaverndarumsitingin kann krevja at fáa samtalu við barnið í einrúmi, um møguligt saman við serkønum fólki. Barnið eigur í hesum førum at hava hjásitara.<br>*Stk. 9.* Øll skjøl í málinum skulu skrásetast og varðveitast á einum tryggum staði.<br>*Stk. 10.* Tá ið kanning er liðug, ger barnaverndarumsitingin eitt tilmæli, sum verður lagt fyri barnaverndarnevndina. |
| **§ 47.** Áðrenn fyriskipanir verða settar í verk, skal barnaverndarumsitingin gera eina skrivliga ætlan fyri barnið, sum verður løgd fyri | **§ 47.** Áðrenn fyriskipanir verða settar í verk, skal barnaverndarumsitingin gera eina skrivliga ætlan fyri barnið, sum verður løgd fyri |

| | |
|---|---|
| barnaverndarnevndina til støðutakan.<br>*Stk. 2.* Ein meting má gerast av, hvør fyriskipan er tann besta fyri barnið, og útgreinast má, hvør ætlanin er við fyriskipanini.<br><br><br><br><br><br><br><br><br>*Stk. 3.* Tá ið ein fyriskipan verður sett í verk, skal barnaverndarumsitingin gera eina tíðaravmarkaða ætlan fyri fyriskipanina, sum verður løgd fyri barnaverndarnevndina. | barnaverndarnevndina til støðutakan.<br>***Stk. 2.* Ætlanin skal áseta endamálið við fyriskipanini, og hvør fyriskipan skal setast í verk fyri at náa endamálinum. Ætlanin skal taka støði í kanningini eftir § 45. Ætlanin skal, í mun til tey viðurskifti, sum eru lýst í kanningini, seta ítøkilig mál í mun til barnsins trivna og menning í samsvari við yvirskipaða endamálið við fyriskipanini. Harafturat skal í ætlanini verða ásett, hvussu leingi fyriskipanin væntast at vara.**<br>***Stk. 3.* Í málum har barn verður sett heiman, skal ætlanin harumframt áseta, hvør fyriskipan skal setast í verk fyri familjuna, meðan barnið er sett heiman og í tíðini eftir, at barnið er komið heim aftur.**<br>***Stk. 4.* Er talan um barn, ið hevur fylt 16 ár, skal ætlanin áseta ítøkilig mál fyri barnsins skifti til eina vaksnamannatilveru.**<br>***Stk. 5.* Ein felags ætlan kann gerast fyri fleiri børn í familjuni. Ætlanin skal tó taka atlit til viðurskiftini hjá tí einstaka barninum.**<br>***Stk. 6.* Í málum, har atliti til barnið ger, at avgerð um at seta fyriskipan í verk ikki kann bíða eftir, at ein ætlan er gjørd, er nóg mikið við eini stuttari tilskilan av endamálinum við fyriskipanini. Ein ætlan, ið lýkur krøvini í stk. 2-5, skal tó gerast skjótast gjørligt og í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at avgerð um at seta fyriskipan í verk er tikin.** |
| **§ 55.** Fundur við partarnar, har greitt verður frá málinum við møguligum skjalatilfari og vitnisførslu, skal haldast so skjótt sum gjørligt, helst tvær vikur eftir, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur móttikið málið.<br><br><br><br><br><br>*Stk. 2.* Formaðurin í Høvuðsbarnaverndarnevndini kann avgera, at málið verður avgjørt uttan ein samráðingarfund, um partarnir eru samdir um tað.<br>*Stk. 3.* Partarnir skulu kallast inn til fund, sum nevnt í stk. 1, og hava møguleika fyri at siga sína hugsan.<br><br><br>*Stk. 4.* Málið kann fremjast, sjálvt um ein av pørtunum ikki møtir á fundinum. | **§ 55.** Fundur við partarnar, har greitt verður frá málinum við møguligum skjalatilfari og vitnisførslu, skal haldast so skjótt sum gjørligt, helst tvær vikur eftir, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur móttikið málið.<br>***Stk. 2.* Tá eftirmeting skal gerast sambært § 20 og § 24, tó ikki stk. 13, og av bráðfeingisavgerð eftir § 17, skal fundurin haldast í seinasta lagi 1 mánað eftir, at Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur móttikið málið.**<br>*Stk. 3.* Formaðurin í Høvuðsbarnaverndarnevndini kann avgera, at málið verður avgjørt uttan ein samráðingarfund, um partarnir eru samdir um tað.<br>*Stk. 4.* Partarnir skulu kallast inn til fund, sum nevnt í stk. 1, og hava møguleika fyri at siga sína hugsan. **Í málum har fyriskipan um umsorganaryvirtøku skal eftirmetast eftir § 24, skulu fosturforeldur kallast inn til fundin.**<br>*Stk. 5.* Málið kann fremjast, sjálvt um ein av pørtunum ikki møtir á fundinum. |
| <br><br>**§ 62.** Um ein familja við børnum undir 18 ár, ið býr í Føroyum, flytur uttanlands, skal | ***Flutt verður uttanlands***<br><br>**§ 62.** Um ein familja við børnum undir 18 ár, ið býr í Føroyum, flytur uttanlands, skal |

| | |
|---|---|
| barnaverndarnevndin kunna rætta myndugleika uttanlands um, hvør fyriskipan er sett í verk fyri barnið. Um eingin fyriskipan er sett í verk, men barnaverndarnevndin metir, at tørvur er á stuðli, skal barnaverndarnevndin kunna um viðurskiftini hjá familjuni.<br>*Stk. 2.* Um tað tænir málinum, skal barnaverndarnevndin senda tær upplýsingar, sum hon hevur um barnið við, tá ið kunnað verður sambært hesi grein. | barnaverndarnevndin kunna rætta myndugleika uttanlands um, hvør fyriskipan er sett í verk fyri barnið. Um eingin fyriskipan er sett í verk, men barnaverndarnevndin metir, at tørvur er á stuðli, skal barnaverndarnevndin kunna um viðurskiftini hjá familjuni.<br>*Stk. 2.* Um tað tænir málinum, skal barnaverndarnevndin senda tær upplýsingar, sum hon hevur um barnið við, tá ið kunnað verður sambært hesi grein. |
| **§ 63.** Um ósemja er um, hvør barnaverndarnevnd skal taka avgerð í málinum, tekur Barnaverndarstovan avgerð um, hvør barnaverndarnevnd eigur málið. | **§ 63.** Um ósemja er **millum barnaverndarnevndir í Føroyum** um, hvør barnaverndarnevnd skal taka avgerð í málinum, tekur Barnaverndarstovan avgerð um, hvør barnaverndarnevnd eigur málið. |
| **§ 66.** Tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, børn, ið hava fylt 15 ár og avvarðandi barnaverndarnevnd, hava rætt til at kæra avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, sí tó § 64.<br>*Stk. 2.* Fosturforeldrini hava rætt til at kæra avgerðir, tiknar sambært § 20, stk. 1, § 27, § 29, stk. 1 og 31, stk. 1. | **§ 66**. Tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, børn, ið hava fylt 15 ár, hava rætt til at kæra avgerðir, tiknar sambært hesi lóg, sí tó § 64.<br>*Stk. 2.* Fosturforeldrini hava rætt til at kæra avgerðir, tiknar sambært § 20, stk. 1, § 27, § 29, stk. 1 og 31, stk. 1. |
| **§ 70.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann avgera, at tann, ið hevur uppihaldsskyldu mótvegis einum barni, sum verður sett heiman, skal gjalda eitt uppalingarískoyti í tíðini, barnið er sett úr heiminum.<br>*Stk. 2.* Uppalingarískoyti kann bert krevjast, um tað verður mett at vera rímiligt í mun til fíggjarligu støðuna hjá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, ella, um foreldrini liva saman, foreldranna fíggjarligu støðu.<br>*Stk. 3.* Partin av ískoytinum, sum ikki er við til at rinda fyri útreiðslur, ið standast av, at barnið er sett heiman, eigur barnið sjálvt.<br>*Stk. 4.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um uppalingaríkoytið, herundir um støddina á ískoytinum í mun til inntøkuna hjá foreldrunum, um umsiting og møguliga innkrevjing av uppalingaríkoytinum.<br>*Stk. 5.* [2)] Uppalingaríkoyti kann innheintast eftir reglunum í lóg um innheinting av uppihaldsgjøldum við fylgjandi broytingum:<br>1) Toll- og Skattstova Føroya fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum og avgjøldum.<br>2) Lønarafturhald fer fram á sama hátt sum lønarafturhald eftir § 136, stk. 1 í skattalógini. | **§ 70. Er tað eftir lógini um rættarstøðu barnanna álagt einum persóni at rinda barnagjald v.m. til eitt barn, ið verður sett heiman, gongur tað almenna í rættin til barnagjaldið frá gjaldskylduga, frá fyrsta uppihaldsdegi, tó í mesta lagi við eini upphædd svarandi til veruligu útreiðslurnar hjá tí almenna av uppihaldinum.**<br>***Stk. 2.* Tað almenna gongur harafturat í rættin til at krevja barnagjald v.m. ásett ella at krevja barnagjaldið hækkað.**<br>***Stk. 3.* Í sambandi við áseting ella hækking av barnagjaldi sambært stk. 2, kann tað almenna seta eina avtalu um barnagjald til viks, um so er, at avtalan má metast at vera gjørd við tí endamáli at forða tí almenna at fremja heimildina í hesi grein.** |
| **§ 71.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann avgera, at eitt barn, sum hevur fylt 15 ár, skal gjalda eitt uppalingaríkoyti, ímeðan tað er sett heiman.<br>*Stk. 2.* Uppalingaríkoyti kann bert krevjast, um barnið hevur vunnið sær peningin við egnum | **§ 71.** Høvuðsbarnaverndarnevndin kann avgera, at eitt barn, sum hevur fylt **18 ár**, skal gjalda eitt uppalingaríkoyti, ímeðan tað er sett heiman.<br>*Stk. 2.* Uppalingaríkoyti kann bert krevjast, um barnið hevur vunnið sær peningin við egnum |

| | |
|---|---|
| virksemi, og tað verður mett at vera rímiligt at krevja uppalingarískoyti. Tað er tó ikki møguligt at krevja, at uppalingarískoytið verður goldið av fíggjarogn ella fíggjarognaravkasti barnsins.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um uppalingarískoyti hjá børnum, herundir um umsiting og møguliga innkrevjing av uppalingarískoytinum.<br>*Stk. 4.* Uppalingarískoyti kann innheintast eftir reglunum í § 70, stk. 5. | virksemi, og tað verður mett at vera rímiligt at krevja uppalingarískoyti. Tað er tó ikki møguligt at krevja, at uppalingarískoytið verður goldið av fíggjarogn ella fíggjarognaravkasti barnsins.<br>*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um uppalingarískoyti hjá børnum, herundir um umsiting og møguliga innkrevjing av uppalingarískoytinum.<br>*Stk. 4.* Uppalingarískoyti kann innheintast eftir reglunum í § 70, stk. 5. |